Her er eingin . . .

(Framhald frá 1. síðu)

hvat føroyingar vilja. Støða sambandsmanna og javnaðarmanna er greið. Teir vilja vera saman við Danmørk. Støða tjóðveldisins er eisini greið. Teir vilja kvetta, loysa frá Danmørk, men hvat vil fólkaflokkurin. Hvat meinar hann við sjálvstýri og yvirtøku? Hesin spurningur er í dag meira ógreiður enn hann hevur verið nakra tíð áður, og aftan á tað sum fram er farið hesa seinastu tíðina, trúgvi eg ikki, at fólkaflokkurin fer til fólkatingsval fyri at taka fólkatingsumboðið av, og tað er gott tað sama, at fólkatingsumboðið hevur sum sagt allstóran týdning fyri Føroyar.

Fyri tað fyrsta eru teir føroysku fólkatingsmenninir við til at viðgera tær lógir fyri Føroyar, sum gjørdar verða á fólkatingi.

Fyri tað annað lesa teir føroysku fólkatingsmenninir øll tey donsku lógaruppskotini, tá ið tey koma á tingborð. Av hesum lógaruppskotum kunnu teir siggja um tær koma at vera Føroyum at ógagni, og so gera teir sjálvandi vart við seg beinan vegin. Eisini kunnu teir siggja av lógaruppskotunum, sum har ikki er okkurt, sum kundi verið Føroyum at gagni, og og so royna at fáa hesar lógir eisini at galda fyri Føroyar.

Fyri tað triðja eigur føroyski fólkataingsmaðurin at taka sær av øllum áhugamálum hjá føroyingum í Danmark, og táið vit minnast til hvussu nógv ungfólk vit hava har, so skilja vit, at føroyski fólkatingsmaðurin um hann rókir starv sítt og er í Keypmannahavn ta tíð hann skal, hevur úr at gera.

Og so kemur eitt annað afturat, sum vit kanska ikki hugsa so nógv um, men sum tó er ein verunleiki, — Hin føroyski fólkatingsmaðurin er tað besta umboð, sum Føroyar hava úteftir. — Alt gott um løgtingið. Eingin yvir ti, og eingin við síðuna av tí, men tá maður tosar í løgtinginum fer tað sjálvdan út um Nólsoynna, men er fynd í tí, sum føroyski fólkatingsmaðurin sigur, so verður tað endurgivið, ikki bert í donskum bloðum, men viðhvørt eisini í norðurlendskum, og hendingafer eisini í týskum og enskum. — Hin føroyski fólkatingsmaðurin tosar altíð, sum føroyingur, og er hann limur av einum stórum donskum flokki, so hevur hann sæti í lógarnevndunum, og hann verður ørðførari í tinginum í øllum føroyskum málum. Annarleiðis hevur tað verið hjá fólkaflokksmanninum í fólkatinginum. Hann hevur sitið í sjálvdrátti. Tó at tað hevur staðið honum í boði, hevur hann ikki verið limur av nøkrum donskum flokki. Hann er vegna tingskipaninа ikki sloppin í nakra nevnd og hevur tessvegna sitið har, sum ryssa uppi yvir deyðum fyli.

Hetta, at føroyski javnaðarmaðurin hevur verið limur av danska javnaðarflokkinum á tingi, hevur av summum verið kastað honum fyri, at hann er óføroyskur. Tað er ein misskiljing.

Tá eg eri komin á bát við hvørjum tað so enn er, so havi eg róð, tað eg havi orkað.

Eg minnist einaferð grindaboð vóru í Fámjin. Vit fóru avstað við árabátum. Av onkrari orsøk var eg ikki í bátinum hjá okkum. Ein av teimum sum átti bátin, sum eg var við segði við meg: Nú kemur tað til kappróður, men eg rokni við, at tú ert ein sovorðin heiðursmaður, at tú rør tað tú orkar, sjálvt um tað er móti pápa tínum og bróðrum tínum. Hetta skar meg í hjartað, men sjálvandi róði eg, tað eg var mentur.

Eg hevði skammast enn tann dag í dag um eg ikki gjørdi so, og eg hevði eisini skammast um eg ikki, ta tíð eg havi sitið á fólkatingið hevði lagt alla orku í at gera alt fyri Føroya land og fólk, so mikið meira, sum tað har aldri hevur verið neyðugt at rógva móti føroysku bróðrum mínum, tí danir hava altíð verið til reiðar at veita okkum allan tann stuðul sum vit hava neyðugan bæði á sjógvi og landi. Hartil kemur, at teir viðurkenna okkum sum tjóð, og vilja hjálpa okkum at varveita okkara tjóðskap arligu eyðkennir.

Nú hevur onkur sagt, at danir vilja gjalda okkara sjálvstýri um vit kvetta. Hesir menn sum soleiðis siga misstaka seg stórliga. Teir meta okkum saman við tey niðurundirkomnu londini, sum fyrr vóru koloniir. Henda sammeting minnir meg á tað sum Holberg, sáli letur Eramus Montanus siga: En sten kan ikke flyve, morlille kan ikke flyve, ergo er morlille en sten. Tey niðurundirkomnu londini eru frá skaparans hond sera rík lond, men fólkið sum býr har er óupplýst og trælkað. Tessvegna dugir tað ikki at nýta ríkidømi í landinum, men livir í hungur og hall. Tí er tað, at tey gomlu kolonivaldini hava átikið sær at hjálpa teimum niðurundirkomnu fólkunum uppundan, so tey kunnu læra at røkja lond teirra.

Í Føroyum er tað annarleiðis. Klettaoyggjar okkara í Norðuratlantshavinum hava einki ríkidømi. Hjallurin er á sjónum og sjógvur okkara er alt Norðuratlantshavið. Men fólk okkara eru eingi neyðaradýr. Teir eru so mætir menn sum teir hava staðið á skipadekki. Men teir megu til eina og hvørja tíð hava skip at sigla við og virkir á landinum, og á hesum økjum er útviklingurin so stórur á okkara døgum, at tey skip sum vóru nýmótans fyri 6 árum síðan er burtoldað í dag. Tessvegna duga vit ikki í løtuni at síggja fyri endan.

Vit duga ikki at siga: Nú er land okkara útbygt, nú eru vit komnir á mál til at taka loysing. — Taka vit loysing, so gjalda danir hana ikki. So mega vit annaðhvørt leggja hægri skattir á fólk okkara, og tað ganga javnaðarmenn ikki við til, ella selja okkum til okkurt stórveldi, og tað ganga javnaðarmenn heldur ikki við til, tí vit javnaðarmenn eru føroyingar inn í mergin.

Føroya fólk! Hjálp okkum javnaðarmonnum at gera góðar tíðir betur. Tað Danmark sum hevur hjálpt okkum til tann framburð, sum vit hava í dag, er tað av javnaðarmonnum stjórnaða Danmark. Tað vil framvegis hjálpa okkum, tí Danmørk sannar, at eisini danir hava ágóða av samvinnuni. Farið tí maður og kvinna av húsi hin 13. desember og setið krossin við javnaðarlistan, ella við tann mann á listanum, sum tit halda umboðar Føroya fólk best.

Johan Nielsen.

Bróv til Sosialin

FÓLKATINGSMENN

Tá ið vit velja menn í álitisstørv, er tað vanliga við tí fyri eyga, at teir skulu avrika nakað fólki og landi til frama.

Nú hevur Poul A. Andreasen sitið í fólkatinginum eini tvey ár; men enn er ikki frætt frá nokrum sum helst, hann hevur avrikað.

Tað, at hann púra einki hevur gjørt, kann ikki vera av teirri grund, hann ikki hevur tíð — t.v.s. av somu orsøk, hann mátti leggja starvið frá sær sum søknarstýrislimur í Klakksvík á sinni.

Tað hevði verið ógvuliga áhugavert at fingið at vita, hvat Poul Adrian ætlar at avrika komandi ár á danatingi, um hann verður afturvaldur.

Kanska avtaka føroysku fólkatingssessirnar, um teir skulðu kenst ov harðir at sita á?

Á tann hátt slepst ið hvussu so er av við daniseringsgull fyri ein fólkatingsmann.

Klakksvíkingur.

VAL-PRAT

Slítur ikki í —

So tott valini nú eru, slítur valprátið ikki í. Enn tala fólk um urslitið av løgtingsvalinum, nú um nýtt landsstýri ella nýval. Aftrat øllum hesum kemur prátið um fólkatingsvalið og tey mongu søknarstýrisvalini, ið fara fram kring um landið.

EITT SYRGILIGT ÚRSLIT

Í Norðoyum vóru teir ymisku »sjálvstýrisflokkarnir« grammir at heita á fólk og biðja tey bara velja ein av »sjálvstýrisflokkunum« — sama gjørdi hvør tað var.



Grammastir til hetta vóru tjóðveldismenn og fram burðsmenn. Sjálvstýrismenn fóru kanska heldur spakuligari um hurðarnar; meðan — onkur tók til sum hin politiski revurin Hákun Djurhuus) — fólkaflokksmenn ikki virdu hinar lagsbrøðurnar so frætt, at teir mæltu til at velja nakran av teimum — nei, bara fólkaflokkin, sjálvandi!

Fólkaflokkurin fór eisini við øllum rómanum — vann 4,5 pst., meðan hinir taptu 8,4 pst. í mun til seinasta val.

Dýrur var fólkaflokkurin teimum, og dýr var samgongan hesum monnum, ið góvu seg í hóslag við fólkaflokkin.

Ikki færri enn tveir av tingmonnunum í Norðoyum, sum so brøðraliga krupu undir veingjarskjól Hák un Djurhuus, fullu á valinum. Annað var sjálvandi ikki at vænta.

Hvat fekk so hvør einstakur av samgonguflokkum fólkaflokksins í Norðoyum burtur úr samgonguni og hinum sokallaða »sjálvstýrislandsstýrinum?

Jú, hesa miklu afturgongd:

Sjálvstýrisflokkurin	**÷ 3,1 pst.**
Tjóðveldisflokkurin	**÷ 2,9 pst.**
Framburðsflokkurin	**÷ 2,4 pst.**

Slíkur var endin av »sjálvstýrissamgongunni« í Norðoyum, hóast vinning fólkaflokksins: ein bakbrest uppá ÷ 3,9 pst.

* * *

TEY SEINASTU FÓLKATINGSVALINI

Nú farið verður til fólkatingsval hin 13. desember, er sjálvandi áhugavert at kanna eftir, hvussu úr slitini hava verið frammanundan, og vit skulu her draga fram valini hin 15. nov. 1960 og 22. sept. 1964.

	1960	1964
JAVNAÐARFLOKKURIN	**3699 atkv.**	**4134 atkv.**
Sambandsflokkurin	**2388 atkv.**	**3141 atkv.**
Fólkaflokkurin	**2155 atkv.**	**2627 atkv.**
Framburðsflokkurin	**547 atkv.**	**630 atkv.**

Millum fólkaflokkin og framburðsflokkin var listasamband við valið í 1964, og fingu tí hesir annan fólkatingsmannin.

* Ein listi (tjóðveldislistin) við
* Karsten Hoydal fekk 2033 at-
* kvøður, hóast hansara agitati-
* ón fyri tað mesta bygdi á ó-
* hugnaliga atomrædslu, sum tó
* heilt var horvin til løgtings-

* valið nú í heyst.

Valdir vórðu tveir fólkatingsmenn, sum longu nevnt: fólkaflokksmaður og síðan ein javnaðarmaður.

Persónligu atkvøðutøl teirra vóru:

P. M. Dam	**2216**
Poul A. Andreasen	**784**

BØRNIN

Ymist um valið

Gáturnar í dag eru soleiðis gjørdar, at í teimum er okkurt, ið sipar til valið, sum verður komið í týsdag. Vit royna

VALEVNI. Set bókstavarnar niðan fyri annarleiðis saman, og tú fært navnið á einum av valevninum til fólkatingsvalið:

LEON I. J. HANSEN

VALKLOKKAN



Rætt gitt, fært tú at vita, hvørjar summi fara at velja týsdagin:

1— 2 = svar
3— 4 = skipastavir
1— 6 = slætta
7— 9 = líkamslut
10—12 = framvegis


LOYNDARMÁL:

Tá gitt er niðureftir fært tú á 2. og 4. reglu orð, ið sipa til valið:

1	2	3	4	5	6	7

1) eldstøð 2) skunda 3) geva eftir 4) at knýta net við 5) mangla (øvugt) 6) vendi 7) bráðnar.

VAL-FIMMARIN:



1. seta fólk, gera fólk
3. má eingin í vali
4. eru tingm. við hvørt
5. mamma (grønlendsk

Veitst tú

AT undir landsstýrinum, har P. M. Dam var løgmaður og Jóhan Nielsen samstundis fólkatingsmaður, var alt gjørt greitt til útflyting av fiskimarkinum — eftir var bara at áseta dagin — og at hetta varð gjørt eitt ár seinri, enn tjóðveldismenn høvdu sett sær sum »óreingiligt krav«

AT við javnaðar-løgmanni og javnaðar-fólkatingsmanni eydnaðist tað at fáa »egnsudviklingslógina« og lógina um idnaðarlánini at galda fyri Føroyar.

AT við javnaðar-løgmanni og javnaðar-fólkatingsmanni eydnaðist tað at fáa »egnsudviklingslógina« og lógina um idnaðarlánini at galda fyri Føroyar.

AT sambært hesa lóg eru øll stórvirki í Føroyum komin í lag: Flakavirki á Kósini í Klakksvík, sildaverksmiðjan í Fuglafirði, skipasmiðjan á Skála og mong, mong onnur av teimum virkjum, sum í dag lutvis eru grundstuðlar samfelagsins.

AT við javnaðar-løgmanni og javnaðar-fólkatingsmanna ávum eydnaðist tað at vinna okkara núverandi rættindi í Grønlandi, sum tó so syndarliga vórðu misrøkt av »sjálvstýrislandsstýrinum«.

AT ein javnaðar-fólkatingsmaður einsamallur hevur slóðað fyri okkara fulla limaskapi í Nordisk ráð.

SJØVINNA

Farmaskipaflotin

Tað er sterka og óreingiliga mál JAVNAÐARFLOKKSINS at byggja upp eina farmaskipaflota av stórum, nútímans farmaskipum.

Hetta er alstórt mál, ið krevur hundraðir av miljónum krónum; men vit ivast ikki í, at um allar góðar kreftur her á landi og í hinum partinum av ríkinum leggja saman, so er eisini vegurin vísur at røkka at málinum, sjálvt um hetta er ódnartak uttan líka til frama fyri sjóvinnu okkara. Hetta verður ikki framt við loysing ella vitleysum yvirtøkupolitikki. Her er samræði besta leiðin, her er ríkisfelagsskapurin tryggasta grundarlagið. Hetta vil JAVNAÐARFLOKKURIN

Stór nútímans farmaskip til allar okkara langfarasjómenn! Tað er herrópið! Tað er málið! Fylkist við javnaðarmonnum — ikki minst til hetta valið!

VELJIÐ JAVNAÐARMENN í FÓLKATINGIÐ!



BÆRT ÚT

+ ER TAÐ MAKALEYST AV FÓLKAFLOKKSMONNUM ÁT + REYPA SÆR AV NAKRARI + SOSIALLÓGGÁVU - SOMU + MONNUM, SUM Í 1960 - + TÁ SOSIALLÓGGÁVAN VARÐ + FRAMD, SØGDU, AT HETTA + VAR MORALSKT AT RYGG- + BRÓTA FØROYINGAR!

VÆL GJØRT!

Tá hin grái freistar ein mann, sendir hann eina kvinnu, og tá hann freistar ein fólkaflokksmann, sendir hann ein riddarakross.

Telegrafboð

Á telegrafstøðini eru pláss leys fyri tveimum boðdreingjum ella -gentum á 16-17 ára aldri.

E. AKRABERG HANSEN